AGANEVNDIN

**KÆRA 15/2014**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: HB kærir KÍ fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 1. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 04.10.2014 | Aganevndin móttikið kæru: 6. oktober 2014 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna, Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.

## 1. Úrskurður

Aganevndin gongur ikki kæruni frá HB á møti, har kært verður um, at KÍ hevur nýtt ólógligan leikara í dysti millum HB og KÍ tann 4. oktober 2014 í 1. deild hjá monnum, tí at leikarin er fluttur úr lægri deild upp í hægri deild at leika.

## 2. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

HB hevur kært KÍ fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum HB og KÍ tann 4. oktober 2014 í 1. deild hjá monnum.

Í kæruni vísir HB á, at KÍ hevur nýtt ein ólógligan leikara í dystinum tann 4. oktober 2014, og at talan er um leikaran Atla Danielsen, sum ikki var lógligur leikari í nevnda dysti, av tí at hann ikki lýkur treytirnar viðvíkjandi at flyta niður vísandi til grein 9 í kappingarreglunum fyri fótbólt, nú skilnaðardagurin, sum er ásettur av kappingarnevndini, er farin.

KÍ er hoyrt í málinum og hevur víst á at Atli Danielsen hevur leikt við 3. deild síðani hann gavst í EFFO-deildini. KÍ sigur víðari:"Vit síggja ikki nakran trupulleika við at flyta frá 3. deild og upp til 1. deild."

## 3. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 4. Fakta í málinum

Tann 4. oktober 2014 varð dystur leiktur millum HB og KÍ í 1. deild hjá monnum. Atli Danielsen leikti fyri KÍ í omanfyrinevnda dysti.

Sambært upplýsingum frá FSF umsitingini leikti Atli Danielsen seinasta dystin fyri EFFO-liðið hjá KÍ tann 27. juni 2014.

Síðani hevur Atli Danielsen leikt tveir dystir í 3. deild, KÍ - Royn tann 16. august 2014 og Víking - KÍ tann 20. septembur 2014.

**AGANEVNDIN**

Sambært skrivi frá FSF sent út 17. juli 2014, so er ikki loyvt at flyta niður í 3. deild eftir 6. septembur 2014, - tvs at tá Atli Danielsen spældi fyrsta dystin í 3. deild 16.august 2014, so hevur hann leikt lógliga í 3. deild.

Síðani hevur Atli Danielsen leikt 20. sept 2014 við 3. deild, áðrenn hannn so nú leikti við í 1. deildar dystinum millum KÍ og HB.

**5. Lógarverkið**

Í grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt er ásett:
*"Leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild eftir ávísan skilnaðardag, sum kappingarnevndin ásetur fyri hvørja deild sær, tá kappingin verður løgd. Hetta umfatar ikki leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 2. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægri deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8."*

**6. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at grein 9 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt bert hevur reglur um at flyta frá hægri til lægri deild. Grein 9 regulerar sostatt ikki viðurskifti um at flyta úr lægri til hægri deild.

Sambært rundskrivi frá FSF, sent út 17. juni 2014, so er ikki loyvt at flyta niður í 3. deild eftir 6. september 2014. Atli Danielsen spældi fyrsta dystin í 3. deild tann 16. august 2014 og hevur sostatt leikt lógliga í 3. deild.

Aganevndin kann sostatt staðfesta, at leikarin leikti lógliga í dystinum tann 4. oktober 2014.

**7. Niðurstøða**

Leikarin Atli Danielsen leikti lógliga í dystinum millum HB og KÍ tann 4. oktober 2014 í 1. deild hjá monnum.

Kæran frá HB verður sostatt ikki gingin á møti.

**8. Úrskurður**

Aganevndin gongur ikki kæruni frá HB á møti, har kært verður um, at KÍ hevur nýtt ólógligan leikara í dysti millum HB og KÍ tann 4. oktober 2014 í 1. deild hjá monnum, tí at leikarin er fluttur úr lægri deild upp í hægri deild at leika.

**9. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12 í Agareglugerðini, kann avgerðin ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**10. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 8. oktober 2014**

Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna